

Óli Jacobsen
olijacobsen@post.olivant.fo

Ejler Djurhuus:

# Hvalbingar høvdu sítt serliga skemt

**Í seinastu tveimum pørtunum hevur Ejler greitt frá flogvanlukkuna í 1954. Men lívið kundi eisini vera skemt sum til dømis í Hvalba**

Men merkiligt er tað. Tað eru tríggir flúgvarar farnir her um fjørðin. Síðst í 1939 rendi eitt týskt flogfar á Skarvatanga. Har vóru fýra mans umborð, og teir vórðu allir bjargaðir í øllum góðum.

Hesir týskarar vórðu sendir til Havnar, har teir vórðu í varðhaldi. Tá var Týskland í kríggi og hevði brotið ta uttanveltaðu støðu, sum Danmark tá var í. Johan Norðfoss var ein av vaktarmonnunum og hevur hann í Miðvikuni greitt frá hesum.

Men hesir menn gjørdust so truplir, at amtmaðurin fekk sent teir til Danmarkar, beint áðrenn Týskland legði á Danmark. Tá hevur nokk verið sloppið hjá teimum.

Meðan eg lá sjúkur av smittuni í november 1942, var eitt enskt flogfar, sum rendi á fjallið her inni millum Hvalba og Tvøroyri. Tað vóru seks mans við, og fimm teirra doyðu. Tann eini var halaskjútti og sat aftast í flogfarinum. Hann var púra óskaddur. Tað var kolsvart í mjørka, men hann gekk sjálvur eftir hjálp. Hann møtti tá fleiri ungum dreingjum, ein av teimum var Dánjal av Rana. Teir vóru allir 15-17 ár. Teir tosaðu við mannin. Hann spurdi hvat land hetta var. Hann helt, at tað kundi vera Hetland. So spurdi hann, um tað var nøkur bretsk herstøð her. Tað var tað eisini á Tvøroyri.



*Hetta var annað landsstýrið, har Kristian Djurhuus var løgmaður. Tað tók við aftaná løgtingsvalið í 1954. F.v. Edvard Mitens, Kristian Djurhuus og Hákun Djurhuus. Kristian og Hákun vóru skyldmenn, báðir ættaðir úr Áarstovu*



*Margretha, kona Jens Mohr, var eisini ein markant kvinna í grannalagnum hjá teimum í Ólastovu. Her er hon saman við ommusoninum Høgna Mohr*

Teir vóru tá við at byggja summarhúsið hjá Tummas Thomsen, sum kallaðist Sterling. Navnið kom av, at fólk tosaðu um, at tað var fyri pund sterling, hann bygdi, og so setti hann sjálvur navnið á við einum stórum sterlingtekni á portrinum.

Teir komu so til vrakið sum framvegis brendi. Ein teirra fór inn í vrakið. Hann sá flogskiparan sita í sínum setri. Hann var framvegis á lívi. Bæði beinini hjá honum lógu leys á dúrkinum kvett av. Hann hevði framvegis vit. Men hann hevði mist nógv blóð. Men kortini ikki meira enn, at hann var á lívi.

Teir tóku síðan allar menninar úr flogfarinum. Teir riggaðu so fjallstavar og troyggjur til eina børu. Teir fingu tveir uppá býruna. Teir møttu bretunum, sum so tóku yvir. Flogskiparin doyði seinni á sjúkrahúsinum.

## Hvalbingar eru skemtarar

Pápi plagdi at fortelja søgur úr Hvalba. Hann skeyt eina ferð í tríatiárunum ein hund, sum var blivin meldaður. Tað hevur verið okkurt grannaklandur. So seint sum seinasta heyst var tað ein hvalbingur, sum spurdi meg, um eg kendi hetta mál. Men hetta hevði eg hoyrt so ofta. Maðurin, sum átti hendan hundin, hevði goymt hann uppi á loftinum. Tað endaði við, at pápi mátti fara við eini byrsu, sum hann hevði lænt í Hvalba. Hann hevði skotið hundin uppi á loftinum hjá hesum manninum, tá hann ikki vildi koma út við honum. Hetta tosa hvalbingar framvegis um.

Hvalbingar eru fantastiska stuttligir at vera saman við. Eg havi ongantíð verið saman við fólki, sum duga so væl at taka til sum hvalbingar.

Olaf, yngsta barn hjá Gullak Jacobsen, gamla próstinum, hann visti altíð okkurt at fortelja. Eg segði eina ferð við hann: "Skriva tað niður sum tú veit." Tað er so ótrúliga nógv, stuttligt var tað eisini. Hetta kundi vera gull vert fyri eftirtíðina. Eitt hálvt ár aftaná var hann deyður.

Seinastu ferð eg tosaði við hann, segði hann mær eina lítla søgu um hvalbingar. Hetta var aftaná, at teir høvdu gingið heystfjallið. Tá vóru teir farnir í hagan at taka nakrar gamlar ær.

Teir plagdu at rætta tær á Fiskieiðinum, tí sunnara eiðinum í Hvalba. Teir koma so oman av Grímsfjalli móti eiðinum við seyðinum. Ein av hvalbingunum hevði hund við. Hundurin fór inn í fylgið, sum taldi 13 seyðir. Seyðurin verður so kløkkur, at hann loypur avstað móti eiðinum og fer so inn í bergið vestanfyri á Grímsfjalli. Teir vistu, at gøtan endaði har. Teir ganga spakuliga inn. Seyðurin fer undan, og sleppur ikki longur. Knappliga loypir ein ær beint í havið, og allar hinar 12 aftaná. Tað bleiv eitt forferdiligt skil við skeldan og so víðari. So sigur Olaf, at tann eini maðurin sigur einki. Hann stóð bara og segði ikki eitt orð. Tá so skeldaríið fjaraði av, segði hann: "Tað er so líka mikið, hvat tigur siga. Men handan gamla gráa ærin hjá mær, hon leyp so nogv longst!"

Hetta var hvalbiarhumor.

## Eldri enn landnyrðingur norðan

Tað var ein originalur, sum kallast Kristian Ludvig. Hann dugdi eisini væl at taka til. Tað var ein grind tíðliga á vári. Tað var gott veður, og grindin doyði á sandinum. Hetta var áðrenn vegasambandið var komið.

So komu nakrir skúvoyingar. Teir høvdu verið á útróðri og komu uppí grindina. Teir koma so til mín og vilja hava sín part beinanvegin. Men eg segði, at hetta bar ikki til. Grindin mátti merkjast fyrst, og síðan skuldi hon skiftast. Men tað var tað, at tað var byrjað at lota av landnyrðingi norði. Og á hesi ætt kundi fara at runa á sandinum. Teir hildu, at sandurin var so bleytur, at byrjaði at runa, so sukku hvalirnir niður í sandin. Men eg segði so, at hetta mátti so fara at vísa seg. So fóru teir avstað.

Hetta gekk fyri seg í gamla skúla i Hvalba. Har var kommunuskrivstova uppi á loftinum. Hon var lánt í samband við skiftið av grindini.

Men meðan eg tosaði við hesar menninar úti í gongini, hetta var ein langur gangur, har trappan gekk upp á loft, har sat Kristian á Gørðum. Hann var ein eldri maður tá. Hann sat í trappuni við hondum undir kinn og lurtaði eftir okkum, men hann segði einki. Tá hinir eru farnir sigur Kristian: "Tú skal ikki lurta eftir, hvat teir siga. Eg kenni landnyrðing norðan, og eg skal siga tær, at eg eri so nógv nógv eldri enn landnyrðingur norðan!"

Hetta var nú ein originalur máti at taka til. Teir skuldu ikki koma og fortelja sær nakað um landnyrðing norðan.



*Suðuroyar Johanna, kona Óla Tauser, dugdi væl at húsast*

**Komandi partur**
Í komandi greiðir Kristian Djurhus m.a. frá, tá ið rituvíkingar komu við torvi til Havnar. Ejler greiðir millum annað frá, tá ið skotið varð eftir sýslumanshúsinum á Tvøroyri